

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 12 - 2012

# Faroe Petroleum víðkar framleiðslu í Norra

Føroyska oljufelagið Faroe Petroleum stendur fyri at víðka sína oljuframleiðslu á norska landgrunninum, nú norska Petroleumstilsynet hevur givið grønt ljós fyri at taka í nýtslu nýggju oljuframleiðsluna á Hyme olju- og gassleiðini í Norskahavinum. Statoil er fyristøðufelag við 35%, meðan parturin hjá Faroe Petroleum er 7,5%. Hini feløgini, sum eru við í Hyme, eru CDF Suez 20%, Core Energy 17,5%, E. ON Ruhrgas 17,5% og VNG 2,5%. Framleiðslan byrjar í fyrsta ársfjórðingi 2013. Hyme keldan liggur 82 kilometrar úr landi á 250 metra dýpi. Hon liggur í Norskahavinum tætt við stóru oljukeldurnar Njord og Draugen. Graham Stewart, stjóri sigur við oljan.fo, at teir eru sera nøgdir við at vera partur av hesi menningini av eitt av teirra loyvum í Norra. Vit "swappaðu" - býttu um - okkara Mariu fund i Norra í 2010/2011 og fingu afturfyri, frá Petoro, partar í framleiðandi feltunum Njord, Brage og Ringhorne East. Hyme liggur tætt við Njord og er partur av avtaluni við Petoro, sum var sera góð fyri bæði okkum og fyri almenna norska oljufelagið. So mikið góð var henda avtalan hjá Faroe Petroleum, sum eisini var tann fyrsta av sínum slag nakrantíð við almenna norska oljurisan, at hon átti høvuðsyvirskriftirnar í norsku pressuni í fleiri dagar, og haraftrat fekk Faroe Petroleum virðisløn fyri tess góða arbeiði. Graham Stewart vísir á, at teir hava brúkt nógvan pening til at byggja út Hyme feltið í hesum árinum, sum so aftur fer at geva munandi størri framleiðslu til felagið í 2013. Hyme feltið eins og øll hini, sum vit fingu í býtishandlinum við Maria fundið, var og verður sera gott fyri okkara felag leggur Faroe Petroleum stjórin aftrat, sum annars væntar sær nógv av árinum, sum kemur. Hann ynskir øllum viðskiftafólki og øllum Føroya fólki eitt gott nýggjár og eitt gott oljuár í 2013. Mynd - Graham Stewart, forstjóri í Faroe Petroleum saman við Nils Sørensen, stjóra. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller